

Úr stovuni er framúr gott útsýni yvir Nólsoynna, út á Argir og yvir á Velbastaðháls



# Føtur undir egið borð á triðju hædd

**Eigaraíbúðin er eitt frálíkt alternativ til egin hús, heldur Heri Jacobsen, sum valdi at hoppa av langa grundstykkjalistanum í Havn. Herfyri flutti hann við familju sum tey fyrstu inn í størstu íbúðarbygging í Føroyum**

ÍBÚÐARRÁK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens K. Vang*

Tað verður ongin trupulleiki hjá Hera Jacobsen, Ann Vang og synunum báðum at búleikast í fleiri ár framyvir í nýggju íbúðini við Velbastaðvegin.

- Ikki uttan so at vit fáa eini 10 børn, men tað hava vit ikki ætlanir um beint nú, smílist Heri Jacobsen, sum saman við familjuni flutti inn í nýggju íbúðina fyri fýra vikum síðani.

## Pláss fyri óruddi

Tað var eisini støddin á íbúðini, sum hevði rættiliga nógv at siga, tá Heri og Ann gjørdu av at keypa eina av nýggju marglætisíbúðunum við Velbastaðvegin.

- Trupulleikin við íbúðarbygging í Føroyum er oftast, at íbúðirnar heilt einfalt eru ov smáar. Hesar íbúðirnar við Velbastaðvegin eru tær fyrstu í nógv ár, har tað veruliga er pláss fyri eini familju og øllum tí, sum hartil hoyrir, sigur Heri Jacobsen og leggur afturat, at ein familjuíbúð jú má hava pláss fyri kuffertum, jólapyntskassum og øðrum 'óruddi', sum tú ikki brúkar hvønn dag.

Íbúðin hjá Hera og Ann er 105 fermetrar, umframt eitt tilhoyrandi depotrúm, ið er 10 fermetrar til støddar. Hartil er øll tann niðasta hæddin í íbúðarbygninginum innrættað sum ein felags kjallari, har gott pláss er fyri barnavognum, súklum o.líkn.

Í sjálvari íbúðini eru køkur/stova, tvey kømur, baðirúm og vaskirúm. Køkur og stova eru í sama rúmi, ið er so stórt, at ongin trupulleiki er, at gera ein part av rúminum til kamar, um tey skuldu fingið hug til tað.

## Vanabundnir føroyingar

Heri og Ann hava leingið droymt um at seta føtur undir egið borð. Og sum so nógv onnur ímyndaðu tey sær, at borðið skuldi standa í egnum húsum. Heri greiðir frá, at eins og tey flestu hugsaði hann ikki longur, enn at tey antin skuldu byggja ella keypa síni egnu hús.

- Vit føroyingar eru ótrúliga vanabundnir, tá vit hugsa um, hvussu man helst eigur at búgva. Hinvegin, tá ið vit nú høvdu tvey smá børn og framvegis stóðu sum nummar fýrahundraðog-nógv á listanum til eitt grundstykki í Havn, gav tað íblástur til at hugsa eitt sindur øðrvísi, sigur Heri, sum heldur ikki dylur yvir, at húsaprísirnir í Havn ikki freistaðu hann so øgiligt at keypa eini hús.

- Knappliga gekk tað eisini upp fyri mær, at tað í grundini ikki hevði serliga stóran týdning fyri meg at



Stóru vindeyguni og nógva plássið gera, at íbúðin kennist ljós og løtt at koma inn í



Alrúmið er so mikið stórt, at ongin trupulleiki er at gera eitt eyka kamar, um familjan fær hug til tað